Koyrikort?

Nýggj teoriskeið
til persónbil, byrja
**mánadagin 18. Okt.**
kl. 17.30

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99 • 21 10 96
stanley@post.olivant.fo

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

SISERO 351800


# Nýggja HB-bókin løgd fram sunnudagin

TÍÐINDASKRIV
*frá Havnar Bóltfelag*



*Á almennari móttøku, sum verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 17. oktober frá kl 16-20 í samband við 100 ára føðingardagin hjá HB, verður nýggja HB-bókin løgd fram*
*Savnsmynd*

Á almennari móttøku, sum verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 17. oktober frá kl 16-20 í samband við 100 ára føðingardagin hjá HB, verður nýggja HB-bókin løgd fram. Súni Merkisstein hevur skrivað bókina, sum fevnir um árini 1955 fram til í dag.

Í bókini, sum er 466 síður og hevur fleiri enn 500 myndir, harav nógvar litmyndir, skrivar Súni um stóra framburðin, HB hevur verið fyri seinastu 50 árini. Portrett eru av fleiri enn 60 leikarum, og nógv úrslit frá øllum deildum eru sett upp í talvur. Annars er bókin í høvuðsheitum ein kronologisk gjøgnumgongd býtt á 10 ára skeið, sum viðgerð vøksturin og framburðin hjá HB. Sum vera man er 1. deildarliðið hjá monnum væl umrøtt í bókini.

Fyrru HB-bókina, sum fevndi um tey fyrstu 50 árini árini frá 1904-1954, skrivaði Jógvan Arge, tá HB fylti 90 ár. Súni og Jógvan fara á móttøkuni at siga nøkur orð um søguna hjá HB, og spennandi verður at hoyra, um Súna hevur eydnast at fáa tey feskastu úrslitini frá í ár við. Høvi verður at ogna sær bøkurnar á móttøkuni.

Eins og við fyrru bókini hevur Marni Mortensen verið høvundunum ein hollur stuðul við at útvega myndir og hagtøl. Team 85 hevur staðið fyri umbróting og repro. Bókin er prentað í Danmark.

## Høvi at heilsa HB

Í Norðurlandahúsinum verður eisini høvi til at ynskja HB tillukku við degnum. Eftir heilsanirnar og møguligar gávuhandanir fer filmsapparatið í gongd við filmsbrotum frá byrjanini av 80'árunum og fram til í dag.

Handaðar verða eisini heiðursnálir til leikarar, sum í ár hava leikt fleiri enn 100 dystir, og HB-Stuðlar fara at kjósa Ársins leikara. Hesin verður funnin við atkvøðugreiðslu eftir hvønn dyst, har áskoðararnir atkvøða. Myndir frá 70'árunum verða at síggja, og kór fer at syngja.

Móttøkan í Norðurlandahúsinum er upphiting til stóru gallaveitsluna, ið verður leygardagin 23. oktober í Ítróttarhøllini á Nabb. Roknað verður við fullum húsi.

## 100 ára tiltøk gjøgnu árið

Havnar Bóltfelag hevur gjøgnum árið hátíðarhildið 100 ára føðingardagin við ymiskum tiltøkum. Nevnast kunnu nýggja HB-fløggan, nýggja HB-bókin og nýggja búmerki. Stórur fótbólts- og stuttleikadagur var fyrr í summar fyri yngru limirnar, og myndaframsýning hevur verið í SMS. Í HB-Rásini, sum hevur verið hvønn fríggjadag frá kl 17-18 á Rás 2, hevur eisini verið gjørt nógv burtur úr 100-ára degnum. Harumframt hava HB-Stuðlar skipað fyri stórari lutaseðlasølu.


**Skeið v/Atle Dyregrov**
4. november kl. 8.00 - 15.30
á Hotel Føroyum
Tilmelding innan 18. oktober!
Kostnaður einans kr. 1.500,- MVG. frítt

*Tema á degnum:*

**Tilbúgvingarætlanir**
- Hvør ger hvat? Hvat eigur at verða gjørt? Av hvørjum og nær? Kreppuleiðsla. Samstarv í kreppustøðu

**Skipaðir bólkar tíðliga aftaná kreppuuppliving**
- Hví brúka bólkar? Hvussu skipa og strukturera vit sorgarbólkar fyri børn? Nýtsla av bólkum fyri børn, ið hava verið fyri traumatiskari hending.

"Det er ingen god idé å kopiere en annens beredskabsplan og tro at en har en god beredskap"
"Desværre er det mange, som lever på en illusjon av usårbarhet, hvor de tenker, at det er noe, som skjer andre og ikke oss..."
Citat: Atle Dyregrov

Synergi
www.synergi.fo
synergi@synergi.fo
Tel. 227464 - 225462
Fax. 322355


# Dr. Atle Dyregrov vitjar aftur

TÍÐINDASKRIV

Vælumtókti serfrøðingurin Dr. Atle Dyregrov verður aftur á klettunum 4. november, har hann fer at hava eitt kombinera skeið um:

1. Tilbúgvingarætlanir í skúlum og á stovnum
2. At hjálpa børnum í bólkum, ið hava verið fyri traumatiskari hending

Dr. Atle Dyregrov helt skeið í Føroyum í mars mánaða og eftirmetingarnar góvu honum toppkarakter. Hann verður roknaður sum ein av heimsins fremstu serfrøðingum innan hetta øki. Skeiðið verður á Hotel Føroyum 4. november frá kl. 08.00 - 15.30. Tilmeldingarfreistin er 21. oktober.

Skeiðið er deilt upp í tveir partar:

**1. Tilbúgvingarætlanir:**
- Hvør ger hvat?
- Hvat eigur at verða gjørt?
- Av hvørjum og nær?
- Kreppuleiðsla
- Samstarv í kreppustøðu

2. Nýtsla av skipaðum bólkum tíðliga aftaná kreppuuppliving

- Hví brúka bólkar?
- Hvussu skipa og strukturera vit sorgbólkar fyri børn
- Nýtsla av bólkum fyri børn ið hava verið fyri traumatiskari hending

Í sambandi við gerð av sorgtilbúgvingarætlan í skúlum, kann nevnast, at fleiri skúlar í m.a. norðanlondum hava fingið vegleiðing frá og nýtt bøkur /hefti hjá Atle Dyregrov. Atle Dyregrov hevur skrivað fleiri bøkur, m.a. "Sorg hos barn" ,

"Små barns sorg" og "Sorg og omsorg i skolen".

Tilmelding og fleiri upplýsingar á heimasíðuni www.synergi.fo ella á tlf. 227464/225462 millum kl. 13-16 gerandisdagar.


**Háskúlaskeiðið**
frá 5. januar til síðst í juni **2005**

**Felagstímar - Námsferðir - Uttanlandsferð**
**Valtímar:** Tilevning, Smíð, Málningalist, Tekstil, Skriviverkstaður, Leirverkstaður, Matgerð, Myndaverkstaður, Filosofi

**Føroya Fólkaháskúli**
Set teg í samband við okkum um gjøllari upplýsingar

Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn
tlf. 31 17 43 - fax. 31 96 87
ffh@skulin.fo - www.skulin.fo/ffh


# Haldor Holm Cup 2004

TÍÐINDASKRIV

Árliga Haldor Holm Cup kappingin verður leikt nú um vikuskift í Klaksvík. Við vera 6 teir bestu leikarnir frá kappingarárinum í fjør: Henrik B. Pedersen, Kristian Suni Høgnesen, Bjarni Skaalum, Ólavur Kjølbro, Sonhard Johannesen og Max Rasmussen.

Lagt er upp til sera stóran spenning, tí ongi avboð eru í ár. Í fjør gjørdu klaksvíkingarnir Kristian Suni, Ólavur og Sonhard bart við at fara avstað við øllum heiðursmerkjaplássunum í nevndu røð, men hetta verður neyvan úrslitið í ár. Henrik, sum í 90'unum vann kappingina ikki færri enn 6 ár á rað er nú við aftur fyri fyrstu ferð í 5 ár. Lítið man eisini vera at ivast í, at hann ætlar sær at vinna sær enn eitt pláss á stóra og snotuliga Haldor Holm steypinum. Bjarni Skaalum, sum í vár var sera nær við at koppa Henrik í semifinaluni og Max, sum í 2001 var føroyameistari, kunnu eisini saktans við einum sindri av hepni vinna kappingina. Luftin er tó ikki farin úr dynamisku trio'ini úr Klaksvíkar Billardfelag, sum trý ár á rað hevur vunnið FM í liðkappingini.

Um zmetast skal um nakran favoritt, so man føroyameistarin fyri einstaklingar Henrik B. Pedersen nevnast saman við 2'aranum frá í vár, Kristian Suna Høgnesen.

Haldor Holm Cup varð fyrstu ferð leikt í 1989. Í ár, sum øll undanfarin ár, verður kappingin leikt í hølunum hjá Klaksvíkar Klubba.






Um eitt brúdleyp, veitsla ella móttøka skal verða væleydnað er neyðugt at barrin er í lagi. Vit átaka okkum at standa fyri barrini og alt sum í henni skal vera. Okkara rutineraðu barrfólk skeinkja, rudda gløs av osfr. Vit ráðgeva um vín og øl, nøgdir, spiritusmenu, vælkomstdrykkir. Vit hava sera kappingarførar prísir og er ongin veitsla okkum ov lítil og ongin ov stór.

Eisni er okkara Vertshús sera vælegnað til smærri veitslur, og nú má hugsast um Jólaborðhaldið !

Ringið til telefon : 51 48 47

VIP
Restorff
DRINKS & CATERING

Sosialurin 341800



**LEIRVÍKAR KVØLDSKÚLI**
Skúlaárið 2004/05

| Grein | Tíð | Tilmelding |
|---|---|---|
| Gentukór | Eftir avtalu | Dánjal Eysturstein tlf 443204 |
| Modellsmíð | Týskvøld kl. 19.00-22.00 | Edvin Joensen tlf 443266 |
| Teld | Mikukvøld kl. 19.00-21.40 | Jákup Meinhard tlf 443273 |
| Máling og list | Týskvøld kl. 19.00-20.40 | Sámal Toftanes tlf 443100 / 222580 |
| Guitar | Týskvøld | Heri Joensen tlf 223735 |
| Trummur | Týskvøld | Kári Streymoy tlf 220679 |
| Ættargransking | Týskvøld kl. 19.00 - 21.40 | Kristjan Martin Eliassen tlf 443252 |

Um ikki annað er avtalað, so byrjar undirvísingin í viku 43

Kostnaður fyri hvørt skeiðið er kr 300.

LEIRVÍKAR KVØLDSKÚLI · TEL 443 234 / 743 234



**Lær at úttala teg beinrakið í miðlunum!**
**Skeið: „Sjónvarpið kemur um ein tíma! v/TV2 Midt Vest!“**

**Hevur tú drúgvar royndir** í at úttala teg í sjónvarpi og øðrum miðlum, men manglar eitt gott amboð, til at fáa tað síðsta uppá pláss, kanska serliga, tá tú skalt úttala teg her og nú?

**Ella fært tú ilt í búkin** og hjartabankan, tá sjónvarpið ella aðrir miðlar biðja um eina viðmerking? Sigur tú altíð nei - tú hevur "ikki stundir"? Tú torir stutt sagt ikki at taka kjansin!

**So er hjálp at heinta á hesum skeiði!**

Á skeiðnum lærir tú at síggja sjónvarp og aðrar miðlar, sum ein møguleika í staðin fyri eina hóttan! Tú fært innlit í, hvussu miðlafólk arbeiða, hvørjar framferðarhættir tey brúka, og tú lærir at føra tín boðskap fram, stutt og greitt, til gagns fyri bæði teg og móttakaran.



**MAX. 8 luttakarar á hvørjum skeiði**
**Vit hava 2 skeið:**
• **Fríggjadagin 19.** november (1 pláss eftir)
• **Leygardagin 20.** november (fá pláss eftir)

Tilmelding og meira um skeiðið á www.synergi.fo.

TEL 22KIMA (225462) · 22RING (227464)
FAX 322 355 · WWW.SYNERGI.FO · SYNERGI@SYNERGI.FO
Synergi

Sosialurin 341800



Barnagarðurin á Velbastað søkir eftir
**Pedagogi**
at byrja 1. desember.

Barnagarðurin heldur til í hugnaligum sethúsum, beint við á og haga.
Í barnagarðinum eru 23 børn og 4 vaksin.

Vit hava
· eitt spennandi uttanduraumhvørvi
· góðar innanduraumstøður í 3 hæddum
· eldhugaði starvsfólk
· góðan trivna
· eina vøggustovudeild við 11 børnum í Kirkjubø
· á vetri 2005 flyta vit í nýggjan dagstovn

Vit ynskja
· at tú hevur góð samstarvsevnir
· hevur áraði og hug til at geva børnunum avbjóðingar í gerandisdegnum
· at tú vil verða við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi

Starvið skal setast 1. desember.
Starvið er eitt barsilsvikariat, men hjá pedagogi er møguleiki fyri varandi starvi.

Skrivlig umsókn, við prógvum og viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagið 20.10.04.
Umsóknin skal sendast til Barnagarðin á Velbastað, Undur Borgarhálsi, 176 Velbastað.

Meiri fæst við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara, á tel. 328121.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Sosialurin 341800



Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!